## Gerrard fer við til Spania

Stórspælarin hjá Liverpool, Steven Gerrard, sum hevur alstóran týdning fyri liðið, er nú tøkur aftur. Ið hvussu er verður Steven Gerrard partur av hópinum, sum fer avstað til spanska høvuðsstaðin, Madrid fyri at spæla ímóti spanska stórfelagnum, Real Madrid í 1/8 finaluni í Champions League kappingini. Real Madrid og Liverpool spæla mikukvøldið kl. 19.45. Tað hevur verið ivi um Steven Gerrard fór at verða klárur til dystin ímóti Real Madrid, men Liverpool-venjarin, Rafael Benitez hevur góðar vónir: - Steven verður partur av hópinum. Hann kláraði tað væl til venjingina í morgun. Talan var um servenjingar, so Steven var ikki testaður 100%, men hann gjørdi tað gott. Nú mugu vit bara síggja hvussu langt tað ber. Sigur Benitez við heimasíðuna hjá Liverpool.

## Beckham livir í vónini

David Beckham vónar framvegis, at hann kann halda fram í italska stórfelagnum, AC Milan, aftaná 8. mars, tá leigusáttmálin millum amerikanska felagið, LA Galaxy og AC Milan gongur út. Enski landsliðsspælarin spældi við Milan ígjár, tá teir ígjár vunnu 1-0 á Cagliari. Yvirfyri BBC staðfesti Beckham enn einaferð sítt ynski um at verða verðandi í Milano: - Eg geri alt, sum eg kann fyri at sleppa at verða verðandi her. Eg havi verið ovurfegin fyri tíðina her. Samráðingar eru framvegis millum feløgini, og tað eru nógv fólk, sum royna at finna eina loysn. Eg vóni, at ein loysn verður funnin. Sigur David Beckham. - Eg havi spælt væl á vøllinum fyri Milan, og eg havi staðfest, at eg vil verða verðandi, og so kann eg ikki gera meir. Tað hevur verið ein stór uppliving at spæla saman við hesum spælarunum, og at spæla á San Siro leikvøllinum. Eg kann bert vóna, at tað eisini verður so í framtíðini.



# Champions League byrjar aftur

**Longu í 1/8 finalunum eru spennandi uppgerðir millum stórfeløg í væntu**

CHANPIONSLEAGUE
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Vetrardvalin hjá evropeisku meistarakappingini í fótbólti er farin aftur um, og er nú klárt til at byrja uppá 1/8 finalurnar í kvøld. Tær fyrstu fýra 1/8 finalurnar, sum verða spældar í kvøld eru: Arsenal-Roma, Atletico Madrid-FC Porto, Lyon-Barcelona og Inter-Manchester United. Serligt fokus er á dystin millum Inter og Manchester United. Gamli Chelsea-venjarin, José Mourinho er nú venjari hjá Inter, og gleðir hann seg veruliga til at skula takast við sín gamla kappingarneyta, Alex Ferguson aftur. Mourinho, sum ongantíð hevur mangla sjálvsálit, hevur verið frammi og sagt, at hann hevur æruna av, at Manchester United er eitt so gott lið nú. Tá Mourinho ráddi fyri borgum, vann Chelsea enska meistaraskapið tvey ár á rað. Mourinho heldur, at dominansurin hjá Chelsea pískaði Manchester United til at taka seg saman. Mourinho heldur, at United er eitt nógv betri lið, tí hann tvingaði teir til tað. Tað er tó ikki reypið hjá Mourinho, sum nívir Alex Ferguson mest

### Stendur illa til í verjuni

Tað stendur illa til í verjupartinum hjá Manchester United fyri týðandi dystin ímóti Inter í Champions League í annaðkvøld. Seks verjuspælarar eru skaddir, hava leikbann ella eru ivasamir, og í løtuni vónar venjarin, at hann í minsta lagi fær sett tveir miðverjar á liðið frá byrjan. Wes Brown, Gary Neville og Rafael eru skaddir, og Nemanja Vidic er leikbannaður. Harafturat eru bæði Johnny Evans og John O´Shea ivasamir, men Sir Alex Ferguson vónar, at annar teirra kann spæla saman við Rio Ferdinand í miðverjuni. - Hetta er ein marra fyri okkum, men hóast tað er rættiliga ivasamt í løtuni, so vóni eg, at tveir av miðverjunum verða tøkir, sigur Alex Ferguson. José Mourinho er vísur í síni søk: - Eg havi sagt við Interspælarnar, at teir skulu ikki óttast hesa uppgerðina, tí um 15 dagar kunnu vit hátíðarhalda, at vit hava vunnið á teimum ráðandi Champions League-meistarunum.

### Ringur standur í Arsenal

Standurin er ikki góður í Arsenal. Arsene Wenger hevur nógvar góðar spælarar á skaðalistanum, so sum Theo Walcott, Tomas Rosicky og ikki minst Cesc Fabregas. Wengar fær heldur ikki gagn av Arshavin í Champions League, tí Arshavin hevur longu spælt Champions League dystir fyri gamla felag sítt, Zenit Sankta Pætursborg. Nógv hongur á herðunum hjá Robin van Persie. Wenger og starvsfelagin hjá mótstøðuliðnum í annaðkvøld, Spaletti hjá Roma hava eina rættiliga líka fótbóltsfilosofi, har stórur dentur verður lagdur á álopspartin. Vit onnur kunnu bert vóna, at Spaletti og Wenger eisini fara at praktisera sína siðvandu fótbóltsfilosofi í báðum 1/8 finalunum.

### Málregn í Barcelona

Álopsspælarnir hjá Barcelona hava ikki havt trupuleikar við at funnið málmeskarnar í hesum kappingarárinum. Lionel Messi, Samuel Eto´o og Thierry Henry hava rokast í álopspartinum, Messi, Eto´o og Henry hava samanlagt skorað 48 mál í Primera Liga, tí bestu sponsku fótbóltsdeildini. Tað eru fleiri mál, enn nakað annað topplið í teimum stóru evropeisku fótbóltsdeildunum hava skorað tilsamans. Kortini snávaði Barcelona í grannauppgerðini ímóti Espanyol. Lyon, sum hevur dominerað fronsku liguna seinastu árini, verður ikki mett at verða líka sterkt, sum tey undanfarnu árini. Koma Messi, Eto´o og Henry aftur á málslóðina, so verður ikki lukkuligt hjá Lyon at verða fyri. Atletico Madrid hevur fyri stuttum aftur blakað ein venjara á dyr. Hesaferð varð talan um Javier Aguirre. Rokið og óstabiliteturin kring liðið ger ikki uppgávuna ímóti FC Porto lættari. Porto hevur ikki gjørt tær stóru skreytirnar seinastu árini, men nú er liðið aftur á odda í portugisisku liguni, og liðið er væl fyri.

## Enn ein enskur fótbóltsbóklingur um Føroyar

Bóklingur við kunnandi tilfari um føroyskan fótbólt fæst nú til keyps
Skotski rithøvundurin, John Ronaldson frá Ronaldson Publications í Edinburgh í Skotlandi hevur givið út ein bókling um føroyskan fótbólt. Bóklingurin nevnist: »Directory of Faroese Football - The comprehensive guide to football in the Faroe Islands«.
Í bóklinginum er ein kunning um øll tey føroysku fótbóltsfeløgini, og myndir av leikvøllunum hjá teimum. Øll úrslitini frá vaksnamannadeildunum frá 2008 eru eisini í bóklinginum. Haraftrat eru øll úrslitini hjá føroyska A-landsliðnum, síðani altjóða limaskapin í 1988. Úrslitini hjá teimum føroysku feløgunum í teimum evropeisku kappingunum eru eisini at finna í bóklinginum. Søguligt yvirlit yvir avrikini í steypakappingi og landskappingini hjá teimum ymisku feløgunum er eisini at finna í bóklinginum. Ein veikleiki við bókini er kortini, at niðurløgd feløg, sum Skansin og Æsir verða nevnd. Men eingin útlendingur, sum skrivar um Føroyar og føroysk viðurskifti man verða verri, enn tær keldurnar viðkomandi hevur. Annars er samlað talan um ein bókling, sum er verdur at geva útlendskum fótbóltsfjepparum, sum eina viðkomandi kunning. Bóklingurin fæst til keyps hjá Rit og Rák í SMS, og eisini hjá H.N. Jacobsens bókahandli í miðbýnum í Havn.

*HS*